## Vælkomin, vælkomin!

**Navn** ______________________________

**Tú skalt ganga í** ______________________________

**Har arbeiða** ______________________________



## Viðtøkur fyri dagstovnin Korndalsgarð.

Dagstovnurin Korndalsgarður er ein kommunalur stovnur.
Stovnurin er fyri børn í aldrinum ½ ár til og við 2. flokk.

### Stovur

Á stovninum verður ein vøggustova við 12 børnum í aldrinum ½-2 ár. Barnagarðsstovurnar verða tvær. Ein smábarnastova við 14 børnum í aldrinum 2-4 ár. Hin ein við 20 børnum í aldrinum 4-7 ár. Ein frítíðarstova verður við uml. 20 børnum í aldrinum 7 ár til og við 2. flokk.

### Upplatingartíðir

Stovnurin hevur opið frá kl. 07.00 til 17.00. Vit lata upp í felagsrúminum og eta morgunmat har til umleið kl 09.00; tá fara vit inn á stovuna. Vit lata aftur í felagsrúminum og møtast har kl 16.00.

Eru boð til stovuna áðrenn kl 09.00 og eftir kl 16.00 skal ringjast til felagsrúmið: Tlf. nr.

Barnið skal vera á stovninum áðrenn kl 09.30, um ikki annað er avtalað, so arbeiðið kann verða lagt til rættis. Tó koma børnini í frítíðarstovuni eftir lokna skúlatíð.

### Tá barnið kemur og fer

Minnist altíð til at boða starvsfólkunum frá, tá tit eru komin um morgunin, og somuleiðis tá tit fara heim.
Hetta er neyðugt, um øll skulu kenna seg trygg, bæði børn, starvsfólk og foreldur. Umráðandi er eisini at siga okkum, hvussu barnið er fyri um morgunin, tá tit koma. Um barnið hevur sovið illa, ella broyttar umstøður eru í familjuni so sum sjúka ella annað, sum kann ávirka dagligdagin hjá barninum.

Um barnið skal heim við øðrum barni, skal starvsfólki hava boð um hetta, tá tit koma um morgunin.

Fyri at barnið kann kenna seg trygt hjá okkum, er av stórum týdningi, at tey síggja tykkum fara og sleppa at veittra farvæl. Grætur barnið, troysta vit tað. Tit eru vælkomin at ringja, fyri at vita hvussu gongur.

**Frítíðarstovan**
Foreldur at børnum í frítíðarstovuni skulu geva skrivligt loyvið, um barnið skal ganga heim einsamalt. Um barnið skal heim við øðrum barni, skal starvsfólki hava boð um hetta heimanífrá.

**Tagnaðarskylda**
Vit starvsfólk skriva øll undir treytaleysa tagnaðarskyldu, tá vit verða sett í starv.

**Ráðleggingardagar**
Starvsfólkið á stovninum hava rætt til tveir ráðleggingardagar um árið til tilrættalegging, skeiðvirksemi ella annað í samband við arbeiðið. Hesar dagar taka vit ikki ímóti børnum.
Dagarnir verða kunngjørdir frammanundan.





**Stongt**
Stovnurin hevur stongt hesar dagar um árið:

- Allar halgidagar
- Flaggdagin og Ólavsøkudag
- Ólavsøkuaftan og Grundlógardag frá kl 12.00
- Millum jól og nýttár
- Ráðleggingardagarnar (tveir)

Umframt hesar dagar hava vit stongt 4 vikur um summarið – í viku 30, 31, 32 og 33.



**Frávera/sjúka**
Tá barnið er sjúkt ella hevur frí, skulu tit siga okkum frá áðrenn kl 09.30. Um barnið gerst sjúkt, tá tað er á stovninum, seta vit okkum í samband við tykkum.

Hevur barnið onkra barnasjúku, eigur starvsfólkið at fáa boð um hetta. Somuleiðis um barnið hevur okkurt smittandi so sum lús, eygnabruna, barnaorm ella annað. Barnið kann ikki koma á stovnin, áðrenn tað er sett í viðgerð.

Aftaná sjúku vænta vit, at barnið er frískt og kann luttaka í øllum, sum fyriferst bæði úti og inni.

VIT ÁTAKA OKKUM **IKKI** AT GEVA HEILIVÁG Á STOVNINUM, UTTAN SO AT TALAN ER UM **VARANDI SJÚKU.**

**Kostnaður**
Goldið verður frammanundan (innan tann 10. í hvørjum mánað)

Gjaldast skal á konto nr. **9181-497.457.5** (Eik Banki)
ella **6460-156.081.8** (Føroya Banki)
ella **62203** (Postgirostovan)

| | | | |
|---|---|---|---|
| Vøggustovubarn | 0-3 ár | heilan dag | 2.300,- kr. |
| Vøggustovubarn | 0-3 ár | hálvan dag | 1.250,- kr. |
| Barnagarðsbarn | | heilan dag | 1.775,- kr. |
| Barnagarðsbarn | | hálvan dag | 950,- kr. |
| Frítíðarstovubarn | | | 1.100,- kr. |

Juli mánaði er gjaldsfríur.

**Systkinnafrádráttur**
Um 2 systkin eru á stovninum, fer 25% av gjaldinum hjá tí eldra systkinum. Um tað eru 3 systkin, fer 25% av gjaldinum hjá tveimum teim elstu.

**Uppsagnargrund**
Eru foreldur í eftirstøðu við foreldragjaldinum, kann barnið sigast upp samb. "Kunngerð um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt" nr. 6 frá 25.januar 1995.

**Frípláss**
Møguleiki er at søkja um frípláss til barnið. Frípláss verður roknað eftir inntøkugrundarlagnum árið fyri, ella um inntøkan broytist munandi í verandi ári. Umsóknarblað er at fáa hjá leiðaranum og kommunuskrivstovuni.



**Tá barnið gevst**
Gevst barnið, skal leiðarin hava boð um hetta 1 mánað áðrenn tvs. áðrenn 1. ella 15. í einum mánað.

**Kostur**
Øll børn skulu hava matpakka við. Matpakkin verður etin umleið kl. 11.30. Millummála fáa børnini frá stovninum umleið kl. 14.30.

**Klæðir**
**Barnið skal klæðast eftir veðrinum.** Barnið skal hava regnklæðir, gummistivlar og heit klæðir við hvønn dag. Skiftiklæðir frá innast til uttast skulu liggja í rúminum hjá barninum.
Barnið skal hava inniskógvar.
Foreldrini halda sjálvi skil á rúminum hjá barninum.
Minnist til at seta navn í klæðir og skógvar.
Blæðubørn fáa blæður frá stovninum.

**Góðgæti/Leikur**
Loyvt er ikki at hava góðgætið við á stovnin.
Barnið kann hava leikur við, men stovnurin tekur ikki ábyrgdina.

**Føðingardagar**
Tá barnið hevur føðingardag, eru tit vælkomin at hava okkurt við, so sum køku, bøkur, spøl ella annað, so halda vit føðingardag á stovninum. Eisini ber til at bjóða børnunum heim í føðingardag í stovnstíðini. Her skal tó viðmerkjast, at tá skulu øll børnini á stovuni bjóðast.

**Ætlaði tiltøk**
Tiltøk, sum ætlanin er at seta í verk, vera: Foreldrakaffi, jólahald, føstulávintshald, garðdagur, ommu- og abbadagur og lega.

## Foreldraráð

Hvør stova velur eitt foreldraumboð og ein varalim til eitt foreldraráð. Endamálið er at fremja áhugamál foreldranna í samráð við dagstovnin. Ráðið skal arbeiða fyri at styrkja um trivnaðin og samstarvið ímillum heim, foreldur, stovnin og avvarandi myndugleikar. Foreldraráðið kann m.a. taka stig til eitt hvørt tiltak fyri børn og vaksin og annars hjálpa til, tá felags tiltøk eru á stovninum.



## Foreldrafundir

Tveir foreldrafundir eru árliga, ein um várið og ein um heystið. Foreldrafundurin um várið er ein felags fundur fyri allan stovnin, sum starvsfólk og foreldraráð skipa fyri. Um tit kundu hugsa tykkum okkurt ávíst evni viðgjørt, eru tit altíð vælkomin at tosað við okkum. Foreldrafundurin um heystið er ein fundur, har stovurnar skipa fyri og siga frá um sítt virksemi.

## Foreldraviðtalur

Foreldraviðtalur eru eina ferð um árið, annars eftir tørvið. Tit eru altíð vælkomin at biðja um eina viðtalu, um tit hava okkurt uppá hjarta.

## Royking/rúsevni

Øll royking/rúsevni eru strangliga bannað inni á stovninum og á økinum, sum hoyrir til stovnin.



## Samstarv

Tað er av týdningi, at allir partar leggja seg eftir at fáa í lag eitt gott samstarv sínamillum. Um tit ikki eru trygg við stovnin, so kann tað ávirka barn tykkara. Tí er umráðandi, at báðir partar tosað opið og beinleiðis við hvønn annan, eisini um onkur ónøgd er.

Tað kemur fyri, at barninum tørvar eyka stimbran innan ymisk øki. Um vit ella tit gerast varug við eitthvørt, er umráðandi at tosað opið saman um hetta, fyri at tørvurin hjá barninum verður nøktaður, og barnið fær teir bestu menningarmøguleikarnar. Vit hava eina serstovu á stovninum so umstøðurnar til stuðul eru góðar.

Korndalsgarður hevur í samráð við foreldrini møguleika at leita sær hjálp frá NSR tænastuni (Námsfrøðilig og sálarlig ráðgeving) fyri økið.





## Námsfrøðin fyri dagstovnin Korndalsgarð

Hvat er tað, vit meta sera umráðandi í tí dagliga?
Fyri okkum starvsfólk er av stórum týdningi, at børnini og vit kenna stovnin hugnaligan og heimligan, eisini at Korndalsgarður er eitt mennandi stað, har vit trívast og tíma at vera.

Vit føla okkum vælkomin og trygg, at onnur eru góð við okkum, so sum vit eru.

Vit ynskja, at foreldrini skulu kenna seg trygg at lata børnini til okkum. Børnini kenna á sær, um foreldrini eru trygg, og ávirkar tað barnið. Tí er umráðandi at hava gott samstarv við foreldrini.

Vit vilja, at børnini kenna, at vit eru her fyri tey, og gleðast hvønn dag um at síggja tey á stovninum.

Børnini skulu møta vaksnum, sum vísa umsorgan, eru ansin og áhugaði. Tað gevur børnunum eina trygga kenslu.

Vit ynskja, at børnini læra at virða onnur og vísa umsorgan fyri hvørjum øðrum.

Vit stimbra barnsins hugflog og forvitni við at stuðla tí at fáa avbjóðingar.

Vit vilja geva børnunum mennandi upplivingar, bæði innan og uttandura.

Vit ynskja, at starvsfólkini eru glað fyri teirra arbeiðið og stovnin.

